# Ein self-made krambakallur

BYGDARHANDIL. Handilin hjá Ismari Joensen í Fuglafirði hevur so at siga verið óbroyttur síðani hann læt upp í 1956. 80 ára gamli eigarin er bjartskygdur og heldur, at teir stóru sjálvtøkuhandlarnir munnu vera ein døgnfluga



**Ismar Joensen aftanfyri skivuna í gamla handlinum við Gjógvará. Høgrumegin standa konan Elsa, sum hevur tikið sær nógv av apoteksvørunum og sonurin Jóannes, sum einaferð skal yvirtaka handilin**

*Orð og myndir: Dánjal Højgaard*

Ismar Joensen sigst vera ein sannur roknimeistari. Fuglfirðingar taka til, hvussu væl hann dugir at rokna í høvdinum.

Kortini er tað eitt roknistykki, sum Ismar als ikki dugir at rokna út.

Hvussu hann enn vendir og snarar tølunum skilir hann ikki, hvussu hesir nútímans handilsmennirnir kunnu fáa handilin at bera seg. Hann fær snøgt sagt ikki roknistykkið at geva yvirskot.

- Eg eru bangin fyri, at tað gongur bara ein tíð, so steðgar alt við einum braki, ljóðar dapri spádómurin úr Fuglafirði.

Ismar Joensen kennir seg nevniliga sannførdan um, at sjálvtøkuhandlarnir bert eru ein døgnfluga:

- Supermarkedini hava eina avmarkaða tíð. Tað er mark fyri, hvussu leingi tú kanst halda út at selja vøruna fyri innkeypsprís, ljóðar fasit hjá gamla roknimeistaranum

**Petroleum og vekkur**

Handilin hjá Ismari Joensen í Fuglafirði er ein av teimum fáu gomlu bygdahandlunum, sum sjálvtøkuhandlarnir ikki hava gloypt enn.



Handilin hevur verið mestsum óbroyttur síðani hann læt upp í kjallaranum heima hjá Ismari og Elsu í 1956. Sum ein for-vitnisligur fornlutur stendur hann har, beint við Gjógvará. Sum eini hús, sum á undrunarsaman hátt eru sloppin undan eini melduródn.

Vørurnar, sum fara um handilsdiskin eru rættiliga ymiskar. Skjúrtur, koppastell, petroleum, kraftfóður, vekjarar, ludo, bomm og okkurt hissini til húsarhaldið - hvørt um annað.

Nú eru nøkur ár síðani, at tey góvust at selja matvørur, og kundarnir eru í stóran mun rýmdir til handlarnar við teimum bíligu tilboðsvørunum. Til Haraldsen, Keypsamtøkuna og teir enn størru í Runavík og í Havn.

Handilin hjá Ismari hevur kortini einkarætt at selja heiluvág í handkeypi í Fuglafirði, og í dag er tað í stóran mun apotekssølan, sum heldur lív í gamla handlinum við Gjógvará.




- Supermarkedini gloypa øllum handlinum. Tey fara við øllum, staðfestir Ismar.

- Høvdu vit bara okkum sjálvi at hugsa um, so høvdu vit langt síðani verið givin, tí vit eru blivin so gomul. Tað er fyri sonin skyld at vit framvegis hava handilin. Meiningin er, at hann skal skal taka yvir, greiðir Elsa frá.

*- Tað hevði loyst seg betri at farið á børsin.*

Elsa og Ismar eru 80 ára gomul. Sonurin Jóannes er 48.

**Bleytur langabbi**

Ismar Joensen er ikki fyrsti handilsmaður í slektini. Ikki sørt stoltur greiðir hann okkum frá langabbanum, Jógvani Poulsen, sum var fyrsti maður, ið fekk sær handil í Fuglafirði, eftir at kongligi einahandilin varð tikin av í 1850-unum.

Jógvan var frísinnaður maður, sum gekk ímóti einahandlinum. Men gamli Jógvan - vanliga nevndur Jógvan í Niðristovu - hevði ikki krambasál.

- Hann mann hava verið ov eymhjartaður. Omma segði, at langabbi vildi ikki gera tey fátæku fátækari.

Hvussu var og ikki so seldi Jógvan alla sína jørð, og kvittaði seg við alla skuld. Og tá ið hann doyði í 1883 hevði hann ongan handil longur.



**Lagdur undir ágang**

Tað var um Ólavsøkuna í 1935 at Ismar fór til Havnar at læra til krambarkall. Hann fór at arbeiða í handlinum hjá Johannesi Lambaa í Havn.

- Tá eg skuldi byrja varð eg spurdur, hvussu eg væntaði at eg fór at rigga í handli. Eg væntaði ikki, at eg fór at rigga, men eg bar ið hvussu er orð fyri at duga væl at rokna. Tað gekk skjótt hjá mær at rokna út, hvussu nógv fólk skuldu hava aftur, og tá á døgum vóru oyruni smá, minnist Ismar.

Eftir lærutíðina í Havn hevði Ismar ymisk daglønt arbeiði og hann var eisini til skips. Undir krígnum var hann saman við 250 øðrum føroyingum í Íslandi og gjørdi flogvøll fyri bretska hervaldið.

*-Ein keypmaður uttan pengar er sum ein fiól uttan streingir, endurgevur Ismar danska skaldið Oehlenschlaeger*

Tá ið bretar hersettu Føroyar og Merkið varð viðurkent í 1940 arbeiddi Ismar sum blaðmaður á Tingakrossi. Hetta vóru hendingaríkar og dramatiskar tíðir. Og í Dimmalætting var tann ungi sjálvstýrismaðurin á Tingakrossi nærum lagdur undir yvirgangsvirksemi í flaggmálinum:

- Teir søgdu at eg hevði verið uppi hjá amtmanninum og verið ófantaligur, minnist Ismar.



- Teir lugu æruna av fólki, sigur hann um kritikararnar á Dimmu.

Áðrenn Ismar Joensen læt handil upp í Fuglafirði í 1956 hevði hann ymisk handilsagentur og fekst eisini við heilsøluvirksemi.

**Self-made**

- Eg eri ein self-made, sigur Ismar og flennir so hjartaliga.

Ismar Joensen leggur stóran dent á, at hann altíð hevur verið ein sjálvstøðugur handilsmaður. Og tískil hevur hann ongantíð verið við í nøkrum samtaki ella handilsketu, sum kundi tryggjað honum bíligar vørur.

- Tað er av prisippi, at eg ikki havi viljað verið við í slíkum, sigur hann

Men spurningurin er um Ismar Joensen bara hevur verið ov gamaldags og ikki hevur dugað at fylgt við tíðini.

- Har setti tú meg skák mát. Hatta er ikki gott at svara uppá, sigur hann.

- Nei, eg veit ikki um eg endiliga havi verið tilhangari av tí gamla.

**Fjølbroyttur maður**

Ismar Joensen er ein kend bygdarmynd í Fuglafirði.

Eins og langabbin, Jógvan í Niðristovu, sum var bæði grindaformaður og sóknarstýrislimur, hevur Ismar havt mong álitisstørv.

Í tilsamans 12 ár var hann limur í bygdaráðnum í Fuglafirði, og nøkur ár var hann eisini bygdaráðsformaður. Og í løgtinginum loysti hann Jógvan Sundstein av eitt skifti.

Politikki hevur hann stóran áhuga fyri, og fleiri ferðir letur hann blaðmannin vita, at Ismar Joensen er sjálvstýrismaður um ein háls.



Bókmentir og mál hava altíð havt hansara stóra áhuga. Umframt nógvar blaðgreinar hevur hann givið út egið yrkingarsavn og týðingar.

Sonurin Jóannes hevur nú hug at halda, at pápin mestur hevði verið málfrøðingur av onkrum slagi, hevði lagnan ikki viljað tað øðrvísi.

Men slíkt tos kveistar Ismar til viks. Umstøðurnar gjørdu hann til handilsmann, so fekk ikki verið øðrvísi, sigur hann.

**Synd í Haraldsen**

Sambært Ismari Joensen er ein nýmótans handilsmaður ein, sum selur nógva og bíliga vøru - og hevur lítlan vinning.

- Fyrr ráddu handilsmenn yvir øllum samfelagnum. Nú á døgum ráða teir fyri, hvat ið tað skal kosta at dríva ein handil.




- Í dag mást tú hava ráð at dríva ein handil við lítlum umsetningini. Fortjenastan er minimal.

Spurdur um Hans Mortensen er ein betri handilsmaður enn Ismar í Fuglafirði svarar gamli handilsmaður soleiðis:

- Tað má hann so vera. Hann má vera óførur at skaffa vøru fyri dumpingprís, sigur gamli handilsmaður, sum tykir synd í teimum yngru handilsmonnunum nú á døgum:

- Eg haldi tað vera synd í Haraldsen, sum hann gongur og slítur seg upp, sigur hann.

-Tað var sunnari at vera handilsmaður fyrr í tíðini. Tað var tryggari. Risikoin var minni.

Var handilsmaðurin við Gjógvará ungur maður í dag, hevði hann neyvan gjørt sum Mortensen og Haraldsen og teir, letur hann okkum skilja.

- Handil gevur so lítið av sær, at eg hevði helst valt at spikkulera í onkrum øðrum. Tað hevði kanska loyst seg betur at fari á børsin.

Δ

## Nú sær Ismar prísin

Ismar Joensen fekk sjónina aftur eftir eina skurðviðgerð fyri tveimum árum síðani. Fyrr mátti hann spyrja kundarnar, hvat vøran kostaði



- Nú síggi eg sum ein ørn. Hetta er sum ein nýggj opinbering.

Hetta sigur gamli handilsmaðurin, sum var sterkt nærsýntur á báðum eygum líka til hann var 78 ára gamal.

Eyguni hjá Ismari tóku at versna longu á ungum aldri. Tá ið hann giftist hevði hann brillustyki minus 8, og seinni gjørdist sjónin støðugt verri.

- Eg var ikki blindur, men øgiliga nærsýntur, sigur Ismar, sum mátti fáa kundarnar at lesa prísin fyri sær, tí hann sá ikki prísin sjálvur.

Men handilsmaðurin hevði fult álit á, at eingin lumpaði hann:

-Tey hava so ið hvussu so er ikki snýtt meg við vilja, sigur Ismar, sum í eini snarari vend dugdi at rokna út, um prísurin, kundin nevndi, var rættur.

Heima hjá Ismari duga tey eisini at skemta við, at Ismar soleiðis hevur fingið sjónina aftur á gamalsaldri.

Spurdur hvussu fólk sóu út, tá ið hann fekk sjónina aftur, svarar hann heldur turrisliga:

- Tað var eitt sindur misjavnt. Og fer so at fortelja um ein annan bygdarmann sum skuldi hava sagt við konuna, tá ið hann fekk sjónina aftur:“ Ljót visti eg at tú vart, men at tú vart so ljót visti eg ikki“.

- Sit ikki og tvætla so, svarar Elsa aftur.

-Tú visti útmerkað væl hvussu eg sá út tá ið vit giftust. Tá sást tú ikki so illa, sigur hon.

-Eg segði ikki sum hasin maðurin, skundar Ismar sær at leggja afturat.